# Føroya Tele miðjar eftir at senda sjónvarp í oktober

**– Sáttmáli er gjørdur um tað mesta av teknisku útgerðini og nú verður samráðst við ymsar rásir, sum ætlanin er at senda**

SJÓNVARP
*Áki Bertholdsen*



*Føroya Tele hevur gjørt fyribils avtalur við 23-24 sjónvarpsrásir og nú verður samráðst um ítøkiligar sáttmálar. Ein av teimum er antin Canal Plus ella TV 1000*

Ætlanin hjá Føroya Tele at senda sjónvarp, gongur eftir ætlan.

Tróndur Djurhuus, stjóri í felagnum hjá Føroya Tele, sum arbeiðir við ætlanini, sigur, at sáttmálar eru gjørdir við at kalla øll tey, sum skulu levera tað teknisku útgerðina.

– Vónandi er tann tekniska útgerðin sett upp og fingin at virka tíðliga í oktober og vónandi eru vit til reiðar at fara undir sendingarnar stutt eftir.

Tróndur Djurhuus sigur, at í fyrstu atløgu verða tað tey, sum nú síggja Rás Tórshavn, sum fara at síggja nýggju rásirnar hjá Føroya Tele.

Men harumframt er ætlanin at senda av Støðlafjalli og av Brúnaskarði, helst beinanvegin.

– Hetta ber so í sær, at tær stóru kommunurnar í Eysturoynni og Klaksvíkin eisini koma upp í netið beinanvegin.

Hvussu sendinetið síðani verður bygt út, veldst um, hvussu undirtøkan verður og um umstøðurnar annars, men Tróndur Djurhuus leggur dent á, at ætlanin er at byggja út so hvørt, so at tey allarflestu í landinum fáa møguleikan at síggja sjónvrpið hjá Føroya Tele, men hvussu verður við hesum, fær hann onki sagt um enn.

– So skjótt sendinetið er fingið at virka, fara vit at gera eina útbyggingarætlan. Men hetta er nýggj tøkni og vit vita hvussu nógvir sendarar skulu setast upp fyri at røkka størri part av landinum, sigur hann.

## Einar 20 rásir

Tróndur Djurhuus sigur, at teir vita eisini sum heild, hvørjar rásirnar verða, sum skulu senda.

Samráðst verður við tær ymsu rásirnar, men avtalan er við rásirnar um ikki at almannakunngera nøvnini á teimum, fyrenn sáttmálin er undirskrivaður.

Hann sigur, at fyribils avtalur eru við 23 ella 24 rásir, men tað er ikki vist, at allar vera við, men at einar tríggjar, fýra verða sáldaðar frá, tí tað er ikki vist, at tøkniligar avmarkingar fara at forða fyri, at allar verða sendar.

Tó sigur hann, at talan er um rásir, sum føroyingar kenna væl frammanundan og at ongar av teimum heilt fremmandu rásunum eru við, so fólk verða neyvan bilsin av valinum.

Talan er bæði um rásir sum senda tíðindi, ítrótt, sendingar úr veruliga lívinum, undirhald, vísindaligt tilfar og náttúrusendingar, barnasendingar, eina andaliga rás, so úrvalið er rættiliga fjølbroytt.

Ein rás verður eisini, sum sendir filmar burturav. Í tí sambandinum eru tvær rásir kendar í Føroyum, TV 1000 og Canal plus og Tróndur Djurhuss sigur, at Føroya Tele er komið nakað langt í samráðingum við aðra av teimum báðum.

Prísirnar kann hann ikki siga nakað um enn, men hann sigur, at ætlanin er at vera rímiliga kappingarførir við teir veitarar sum eru.

– Tað er avgjørt ætlanin at leggja so til rættis, at Føroya Tele verður sjónvarpsstøðin hjá føroyingum, sigur hann.

Hasar báðar rásirnar, tú nevndi, sum senda filmar døgnið runt, senda eisini pornofilmar?

– Vit standa ikki til svars fyri innihaldinum í tí, sum verður sent. Men vit hava altíð ábyrgd mótvegis landsins lógum og tað skal ongin ivi verða um, at vit altíð fara at fylgja landsins lógum. Annars hava tey ikki viðgjørt innihaldið í teimum ymsu rásunmu so gjølliga, men sakførarar felagsins kanna eftir, hvat landsins lógir siga á økinum.

Annars leggur Tróndur Djurhuus dent á, at sjónvarpið hjá Føroya Tele skal helst verða ein fyritøka, sum øll hin føroyska familjan kann fáa gleði av.

# Karsten Hansen ætlar at gera avtalu við fakfeløgini

**– Hann vil hava fakfeløgini at halda aftur í lønarkrøvunum afturfyri at fáa skattalætta**

LØNARKRØV OG SKATTALÆTTI
*Áki Bertholdsen*



*–Tað ber ikki til at brenna ljósið í báðum endum, sigur Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum*

– Tað, sum hevur týdning, er, hvussu nógv fólk hava eftir í lønarposanum, tá í skatturin er goldin. Og tað er ikki bara ein máti at hækka lønina uppá.

Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, ætlar sær aftur í holt við fakfeløgini.

Men hesuferð verður tað ikki sum mótstøðumaður tvørtur um eitt samráðingarborð. Hesuferð ætlar hann sær at leggja á annan bógv og at fáa í lag samstarv við fakfeløgini, sum allir partar kunnu fáa gagn av.

Fíggjarmálaráðharrin ætlar nevnliga at fáa í lag eina avtalu við fakfeløgini um, lønar- og skattapolitikkin í framtíðini.

Hann sigur, at endamálið er at gera livikorini hjá løntakarunum betri.

– Tað vanliga er, at fakfeløg leggja krøv fram um eina ávísa lønarhækking og so verður samráðst um ein nýggjan sáttmála.

Men fíggjarmálaráðharrin sigur, at tað ber til at hækka lønina upp á fleiri mátar.

– Tað, sum hevur týdning hjá fólki, tað er, ikki, hvussu nógv, tey fáa í løn, men, hvussu nógv tey hava eftir, tá ið skatturin er goldin.

– Og tað, vit hava sæð mong dømi um upp ígjøgnum tíðirnar, og eisini seinastu árini, er, at lønirnar eru hækkaðar, men tað gongur bert stutt tíð, so er øll lønarhækkingin, og kanska meiri enn tað, etin upp av príshækkingun. Sostatt er løntakarin ikki betri fyri, hóast hann hevur fingið lønarhækking og tað førir so aftur til fleiri lønarkrøv og soleiðis er tað skrúvan við ongum enda.

## Gongdin vendast

Og tað er hesari gongdini, lanndsstýrismaðurin ætlar sær at venda.

Tað, sum hann ætlar sær, er at fáa eina avtalu í lag við fakfeløgini um at tey skulu fáa skattalættar, men at tey so afturfyri halda aftur í lønarkrøvunum.

Karsten Hansen leggur tó dent á, at tað liggur fjart frá honum at brúka hetta til at gera Føroyar til eitt lágskattasamfelag, tí hann heldur tvørturímóti, at løntakarin í Føroyum ikki verður afturútsigldur afturímóti grannalondum okkara.

– Tað taki eg á ongan hátt undir við, og hetta hevur onki við tað at gera. Men vit mugu velja í hesum spurninginum: Antin fremja vit fleiri skattalættar, ella halda vit á at trýsta lønirnar í veðrið.

– Tað ber illa til bæði at lækka skattin munandi, samstundis sum lønirnar verða trýstar í topp, sigur Karsten Hansen.

– Tað einasta, vit fáa burtur úr einum áhaldandi lønartrýsti, er ein fløðandi inflatión við príshækkingum og tað ber ikki til at brenna ljósið í báðum endum.

Eitt annað amboð, sum kann brúkast at økja um tað tøku lønina, ella keypiorkuna hjá fólki, er at lækka skattin. økja um tað tøku lønina, ella keypiorkuna hjá fólki, er at lækka skattin.

– Hetta er tann betri mátin, bæði fyri kappingarførið hjá vinnuni og fyri royndina at tálma teimum almennu útreiðslunum.

Karsten Hansen sigur, at býðst eitt høvi, fer hann at tosa við fakfeløgini um málið.

– Men fyri at gera samráðingarnar smidligari og fyri at gera tað lættari at føra ein yvirskipaðan lønar- og skattapolitikk, hava vit samráðst soleiðis, at 1. oktober komandi ár ganga allir sáttmálar ímillum tað almenna og tey ymsu fakfeløgini út.

Og í hvussu so er til tað tí, fer landsstýrismaðurin at leggja málið fyri fakfeløgini, men vit fara skjótast gjørligt at tosa við fakfeløgini um hetta.

– Tað hevur fleiri ferðir verið tosað um hetta sama, men fakfeløgini hava hvørja ferð ført fram, at lønarsamráðingar og skattapolitikkur eru tvey ymisk mál, sum ikki skulu balndast saman?

– Ja, tað eri eg ikki ósamdur um, sum so og sjálvsagt skulu vit ikki samráðast við fakfeløgini um skattapolitikk. Men eg ætli mær kortini at royna og skal hetta eydnast, er tað sjálvsagt av størsta týdningi, at fakfeløgini taka undir við tí og eg haldi, at tað hevur stóran týdning at samskifta við fakfeløgini um hesi viðurskiftini.

– Og fara vit undir eitt slíkt samstarv, er tað eisini neyðugt, at hetta verður gjørt í størsta álvara og at fakfeløgini hava álit á, at landsstýrið eisini heldur sín part av avtaluni.

– Og eg ivist heldur ikki í, at nakað fruktagott kann spyrjast burturúr einum slíkum samskifti, serliga nú lønirnar eru hækkaðar nokk so fitt seinastu árini, tí tað hevði verið øllum samfelagnum at frama og sostatt eisini løntakarunum sjálvum.



# Vísindaligt takksemi




*Hans Andrias Sølvará, t.v., og Knud Simonsen fingu hósmorgunin Granskingargáva Sparikassans. Við heiðurinum fylgja 50.000 kr*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Hans Andrias Sølvará og Knud Simonsen vórðu heiðraðir fyri teirra lut í føroyskari gransking av Føroya Sparikassa. Báðir siga teir virðislønina stimbra áhugan at halda fram við granskingini**

GRANSKING
*Heri á Rógvi*

Í sambandi við, at tað 24. august vóru 170 ár liðin síðani Føroya Sparikassi byrjaði sítt virksemi, so valdi Sparikassin hósdagin at geva tveimum føroyskum granskarum Granskingargáva Sparikassans. Gávan var í hesi sambandi latin Hans Andriasi Sølvará og Knud Simonsen.

Vísindagrunnurin varð settur á stovn í 1986 av nevndini í Føroya Sparikassa, sum helt tað hava alstóran týdning, at vitanarstøðið í Føroyum alsamt megnar at fylgja støðinum, sum er í londunum kring okkum. Á henda hátt fekk Sparikassin ein virknan leiklut í at fremja hetta í verki. Endamál grunsins er at veita fíggjarstuðul til vísindaliga gransking av føroyskum evnum, til fyrireiking av útgávu av vísindaverkum um somu evni og í aðrar mátar at stuðla føroyskt vísindastarv. Fram til dagin í dag hevur grunnurin játtað út móti 2 mió. kr. í stuðli til smærri og størri vísindaligar verkætlanir.

–Føroysk gransking hevur ment seg nógv gjøgnum árini, og í dag er ikki óvanligt at frætta, at føroyingar fáa doktaraheiti bæði á Fróðskaparsetri Føroya og á lærdum háskúlum uttanlands. Føroysk gransking fevnir víða, og tí er grunnurin fegin um at kunna lata Granskingargávu Sparikassans til tveir granskarar, ið virka á heilt hvør sínum granskingarøki. Báðir hava teir megnað at framleggja sína gransking á ein slíkan hátt, at hon er vorðin viðkomandi fyri at kalla allar føroyingar: Knud innan náttúruvísindina við sínum teldumodelli fyri sjóvarfalsrák í Føroyum og Hans Andrias við at vera við til at skriva søgu Løgtingsins frá uppruna tess fram til í dag.

Vísindagrunnurin vónar, at Granskingargáva Sparikassans kann vera ein stuðul til Knud Simonsen at halda fram við at gera gransking, sum annars er sera torskild fyri leikmann, beinleiðis nýtiliga í tí føroyska gerandisdegnum, og vera ein stuðul til Hans Andrias Sølvará at fáa høvi til at fara undir grundleggjandi gransking av føroyskari politiskari søgu við støði í nútímans í metodu og vísindaástøði, segði Bjarni Olsen, stjóri fyri Føroya Sparikassa í røðu sínari, tá gávurnar vórður handaðar hósmorgunin.

Granskingargávurnar eru 50.000 kr. hvør. Pengarnir eru ikki oyramerktir. Báðir søgdu teir seg vera fegnar fyri at hava fingið gávuna frá Sparikassanum.

Hans Andriasi Sølvará helt fyri, at talan var um eina moralska áheitan at halda fram við granskingini. Hendan gávan kom fullkomiliga óvart á Hans Andrias. Hann nevndi øki í politisku søgu Føroya sum økið, hann hevur stóran áhuga fyri at granska í. Eitt nú tíðarskeiðið undir fyrra heimsbardagar og búskaparkreppurnar báðar í hálvtrýssunum og hálvfemsunum. Hans Andrias starvast sum lærari á Studentaskúlanum á Kambsdali.

–Arbeiðið hjá mær setir stór kvør, men eg vil framvegis arbeiða víðari við granskingini, sigur Hans Andrias Sølvará, sum eisini nýtti høvið at takka konuni fyri holla stuðulin.

Knud Simonsen var eisini ógvuliga fegin um at hava fingið hesa virðislønina. Hann vísti á, at tað hevur stóran týdning at geva av sínari vitan. Sjálvur hevði hann notið gott av vitanini hjá øðrum havfrøðingum í havfrøðingum, og hann vildi fegin geva sína vitan víðari. Hann vísti eisini á, at tað hevur stóran týdning, at granskingarfólk sleppa út um landoddarnar eftir vitan.

Grundgevingarnar hjá Føroya Sparikassa og fleiri upplýsingar um Hans Andrias og Knud eru prentaði aðrastaðni á síðuni.

## Hans Andrias Sølvará

Hans Andrias Sølvará, ið er føddur 11. november 1962, tók BA-prógv í søgu og siðsøgu á Søgu- og samfelagsdeildini á Fróðskaparsetrinum í 1990. Hann helt fram við lestrinum á Århus Universiteti og gjørdist cand. phil. í søgu í 1992, og í 1994 varð hann cand. mag. í søgu við hjágrein í heimspeki. Høvuðsritgerðin innan søgulesturin bar heitið Historien og historisk erkendelse i Michel Foucaults arkæologiske og genealogiske analyser. Síðani 1996 hevur hann undirvíst á Studentaskúlanum og HF-skeiðinum í Eysturoy. Eisini hevur hann undirvíst í metodu, vísindaástøði og almennari søgu á Søgu- og samfelagsdeildini á Fróðskaparsetrinum.

Evnini til gransking vóru eyðsýnd longu meðan Hans Andrias læs søgu á Søgu- og samfelagsdeildini. Hetta kom eisini til sjóndar í høvuðsritgerðini við Århus Universitet, sum ein metingarnevnd skýrdi sum »et usædvanlig kompetent og selvstændigt arbejde med en for en historiestuderende forbavsende højt teoretisk niveau. Sølvará præsenterer sig som en lovende og original forsker, navnlig i teoretisk henseende«.

Eftir cand. mag.-prógvið fyrireikaði hann verkætlanina Det nationale problem og hjemmestyrets krise på Færøerne – Et problems historie. Her ætlaði hann at royna modernað nationalismuástøði og modernað søgu- og samfelagsvísindalig ástøði við at kanna politiska mentan í Føroyum við serligum atliti at tjóðskapargongdini og við at analýsera argumentatiónsbygnaðin í føroyskum politiskum skjølum og í pressuni tey seinastu hundrað árini. Verkætlanin er bæði spennandi, kompetent og realistisk, men enn hava umstøður ikki verið at fremja hana í verki.

Sum lærari á Studentaskúlanum og HF-skeiðinum í Eysturoynni og sum leysalærari á Fróðskaparsetrinum hevur Hans Andrias gjørt nógv undirvísingartilfar. Í granskingarligum høpi man høvuðsavrik hansara kortini vera Søga Løgtingsins frá landnámi til 2002 við serligum denti á tíðina eftir 1852 í hátíðarritinum Løgtingið 150. Hvat teirri eldru tíðini viðvíkur hevur Hans Andrias nýtt bókmentir og kanningar hjá øðrum granskarum, men viðvíkjandi tí nýggjastu tíðini er so lítið granskað. Her hevur hann nýtt Løgtingstíðindi, ymisk álit og frágreiðingar fyri at kunna lýsa søgugongdina. Ein reyður tráður er hvørjar heimildir og hvat vald løgtingið hevur havt gjøgnum tíðirnar, sett í samband við hvørjar aðrar stovnar løgtingið hevur samvirkað við um politiskt vald í Føroyum. Løgtingssøgan hjá Hans Andriasi er eitt víðfevnt verk uppá 400 bls. við nógvum upplýsingum, skrivað á lættfatiligan hátt, við greiðari og hentari dispositión og góðum málburði.

Samanumtikið hevur Hans Andrias Sølvará tíðliga í lestri sínum prógvað, at hann hevði teir eginleikar, sum krevjast av einum granskara og eigur at fáa møguleikan at royna seg sum granskari. Harumframt er hann ein frálíkur lærari. Við sínari vitan og ástøðiligu gávum, er hann ein upplagdur granskari, ið kann gera sítt til at endurnýggja føroyska søgugransking.

## Knud Simonsen

Knud Simonsen, ið er føddur 5. mai 1964, tók BS-prógv í alis-/jarðalisfrøði á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum í 1989. Hann helt fram at lesa havfrøði á Geofysisk Institutt á Universitetinum í Bergen, har hann í 1992 skrivaði høvuðsritgerð um flóð og fjøru á føroyska landgrunninum. Ein partur av arbeiðinum snúði seg um at lýsa sjóvarfallið við støddfrøðiligum teldumodelli. Síðani starvaðist hann sum granskari á Nansen Sentrinum í Bergen, og í 1996 vardi hann Dr. scient. ritgerð við heitinum Heat budgets and freshwater forcing of the Nordic Seas and the Arctic Ocean.

Knud Simonsen arbeiddi á Nansen Sentrinum til hann á heysti 1999 varð settur í starv sum lektari í havfrøði á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum. Í hesum starvi hevur Knud Simonsen framhaldandi arbeitt við at gera eitt sjóvarfalsmodell fyri Føroyaleiðini, serliga nær landi, m.a. við atliti til at finna fram til nýggj aliøki. Arbeiðið hevur verið gjørt í samstarvi við Fiskirannsóknarstovuna, Landsverkfrøðingin, , Fiskaaling, Vaktar- og Bjargingartænastuna , Fa. Telduráðgevin og Vinnumálaráðið.

Knud Simonsen er virkin granskari, og hann hevur verið við til at skriva eina røð av vísindaligum greinum og frágreiðingum. Eitt nú hevur hann saman við øðrum skrivað tvær vísindagreinar í høgt metta altjóða tíðarritinum Nature.

Knud Simonsen leggur eisini dent á at kunna leikfólk um síni granskingarúrslit, m.a. hevur hann staðið fyri at menna eina telduskipan, sum kann geva metingar um, hvussu hart sjóvarfalsrákið kann verða á innara landgrunninum. Í somu skipan fáast upplýsingar um botn- og alduviðurskifti. Ætlanin er, at menna skipanina til eisini at veita metingar av sjóvarfallinum til ávísa tíð, t.d. um ein ætlar sær á flot og, saman við Fiskirannsóknarstovuni, Tórshavnar Bátafelag o.ø., at fáa til vega upplýsingar um fiskimið við í skipanina. Telduskipanin er partvíst atgongilig á internetinum (www.streymkort.fo)

Tikið samanum hevur Knud Simonsen í sínum virksemi sum granskari sýnt dugnaskap, áræði og samstarvsvilja. Hann megnar at gera síni granskingarúrslit gagnlig í einum tvørfakligum høpi og atkomilig hjá bæði serfrøðingum, vinnulívi og leikfólki – í einum granskingarøki, sum hevur stóran týdning fyri føroyska samfelagið.